# VÁRFRAMSÝNING 2010
# OPEN SOURCE
## HVAT HENDIR BEINT NÚ
## HVAR SKULU VIT FARA

Í ár hevur Várframsýningin 20 ár á baki. Tað eru **Føroysk Myndlistafólk**, sum á hvørjum ári skipa fyri framsýningini. Umframt at varð-veita ein listaligan pall á høgum stigi, hevur **VÁRFRAMSÝNINGIN 2010** sett sær fyri at spegla nútíðina og gloppa dyrnar fyri framtíðini.

Í ár hava Føroysk Myndlistafólk gjørt av at finna tey nýggju rák og avrik, sum spíra og spretta á føroyska mentapallinum. Tær leiðir, nýggja listin gongur, vilja vit gera sjónligar.

Undir heitinum **OPEN SOURCE** lata vit dyrnar upp fyri nýggjum, listaligum hugsanarháttum.

Í ár ætlar Várframsýningin **eisini** at sýna fram **skitsur og verk, sum eru í gongd** og kanska ikki eru liðug, ella eru partar av verkætlanum, ið ikki eru komnar á mál, og tí eru sjónlig dømi um, hvat hendir beint nú og hvar vit skulu fara.

Í ár hava **Føroysk Myndlistafólk** ruddað veggir og gólv **í Listaskálanum** til tykkara boð um eitt føroyskt listaligt støðumet **- beint nú.**

Í ár er Várframsýning tí ikki bara hin vanliga søluframsýningin, eins og undanfarin ár. Tað er hon eisini. Men **rúm** er eisini fyri einum eksperimenterandi parti á framsýningi.

**TILFAR:** Listaverk, ætlað Várframsýningini 2010, kunnu latast inn sum: **skulpturur, installasjón, málarí, grafikkur, foto designlutur, arkitekturur, video, filmur performance, animasjón, ljóð-list, alnóts-list software-list, visuell poesi**

**STAÐUR:** Várframsýningin 2010 verður hildin í gamla partinum av Listaskálanum og í forhøllini.

**INNLATING:** Myndir av ella greiðar skriftligar lýsingar av listaverkunum verða sendar **INNAN 27. MARS 2010: varfram@gmail.com.** Yvirlit, ið lýsir verk, navn og bústað, verður skrivað í oyðiblað, sum fæst á **www.mynd.fo** Eftir hetta fáa tey luttakandi boð. Spurningar kunnu setast Ole Wich tlf 27 38 40 ella á varfram@gmail.com

**LUTTØKUGJALD: Kr 300,-** Gjaldið verður sett á konto 6460-1585063.

**ÚRVAL:** Nevndin í **VÁRFRAMSÝNINGINI 2010** skilar sær rætt til frítt at velja millum tey verk, sum verða latin inn. Hoyra verkini saman, og kunnu ikki lutast sundur, skal sigast frá um hetta, tá verkini verða latin inn. Hámark, **5 minuttir**, er sett á video, film, animasjón og onnur verk, sum taka tíð at sýna fram.

**9. apríl til 2. maj 2010**

Føroysk Myndlistafólk hava skipað fyri Várframsýningini í Listaskálanum síðani 1990. Í fjør var evnið "Samleiki" og Dennis Agerblad var gestur. 230 fólk vóru til upplatingina. Harumframt vitjaðu 1200 fólk Várframsýningina 2009.


## Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin – blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo


Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík

Søkt verður eftir pedagogi til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík til setan 1. mars 2010 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt pedagogstarv, sum verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin í løtuni er Sambýlið og Bústovnurin á Rúnarvegi í Runavík.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði. Vikuskiftisarbeiði er 3. hvørt vikuskifti.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 763130

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðara

**Umsóknarfreist: 20. februar 2010**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara: www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# JEEPUR TIL SØLU

Vegna trotabúgv selja vit ein Jeep Cherokee. Bilurin er frá 1999.

Áhugað kunnu venda sær til undirritaðu.

**Fríða Patursson, adv. T-postur: frp@jura.fo**

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

# Seniorskeið

24.februar - 5.mars 2010

Fyrilestrar um mentan, list og politikk.
Útferðir og upplivingar

Kostnaður:
Á dupultkamari kr.1.450,-
Pør kr. 2.200,-
Einakamar kr. 2.200,-
Alt íroknað
Ringið ella sendið teldupost
um gjøllari upplýsingar

Føroya Fólkaháskúli
Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn
Telefon 311743 - haskulin@haskulin.fo

Mentamálaráðið

## Umsóknarbløð um upptøku til miðnámsútbúgvingarnar 2010

Umsóknarblað og vegleiðing um upptøku á miðnámsútbúgvingarnar komandi skúlaár kunnu heintast á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum (www.mmr.fo og síggjast undir »Aðrar útbúgvingar« og »Oyðubløð«).

Seinasta freist at søkja er 15. mars 2010.

**Mentamálaráðið**

## Ítróttasamband fyri Brekað

Aðalfundurin verður í Matarhølinum í Svimjihøllini í Gundadali í Havn mikudagin 17. mars 2010 kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**NEVNDIN**

FØROYAR ÍSB

# HÚS TIL SØLU

## Nýggj tvíhús til sølu í Runavík

**TELEFON 56 20 70 / 56 20 80**